Framløga í fíggjarnevndini vegna felagið trolskip

Endamál við uppskotinum er m.a.:

At taka ein størri part av tilfeingisrentuni ella tí "yvirnormala vinninginum" inn til landið.

Vit umboða felagið Trolskip, sum eru lemma- og partrolararar. Tað er eingin loyna at veiðan hjá hesum skipum hevur verið á einum søguliga lágum støði seinastu mongu árini. Kann t.d. nevna at heildarveiðan av upsa í føroyskum sjógvi var 13.000 tons í fjør, sum er minsta nøgd nakrantíð. Søgulig miðalveiða sigst verða 36.000 tons, so støðan er alt annað enn góð hjá hesum parti av flotanum.

Minkandi veiðunøgdirnar viðføra at raksturin av skipunum er tungur og hýran gerst ov lítil og tað viðførir so aftur at tað er nærum ómøguligt at mannað skipini við skikkaðum fólki. Hetta er ein ónd ringrás, sum er trupul at koma burtur úr.

Tað hevur verið eitt sera kærkomið íkast til reiðarí og manningar at bólkur 2 hevur fingið tillutað part av samlaðu makrelkvotuni seinastu árini.

Stóra broytingin, sum hevur verið fyri línuskipini seinastu árini er óivað partvíst fíggja av makrelinum. Har eru nýggjari skipi komin í flotan og tey flestu hava klára seg væl.

Trolaraflotin er gamal og treingir til at verða endurnýggjaður. Onkur reiðarí arbeiða við ítøkiligum ætlanum um at byggja nýggj skip. Um tilfeingisgjald verður lagt á makrelin fyri heimaflotan, so er skjótt at mótið verður tikið frá hesum reiðaríum og ætlaninar verða sleptar.

At siga at man ætlar at taka ein størri part av tilfeingisrentuni á makrelinum fyri bólk 2 halda vit má í besta fall verða ein misskiljing. Har er tíverri ikki nøkur tilfeingisrenta at taka av…

Bólkur 2 hevur nærum bert rættindi í føroyskum øki, meðan t.d. bólkur 3, sum er línuskip, hevur aftrat rættindunum í føroyskum øki, rættindi á Flemish Cap, Eysturgrønland og Ísland. Tað er sera umráðandi at bólkur 2 eisini fær onnur rættindi, serliga um broytingar verða gjørdar við núverandi rættindi.

Hóast lønsemið ikki hevur verið gott í hesum bólki seinastu árini, so er týdningarmikið at vísa á at tað tilfeingi, sum hesin bólkurin siglur til lands, skapar sera nógv virksemi runt um í landinum og hevur tí sera stóran samfelagsligan týdning.

Vit halda tí at landið má finna peningin, sum ætlanin er at taka inn sum tilfeingisgjald frá heimaflotanum, má finnast aðrastaðni ella mugu aðrar sparingar gerast tilsvarandi.

Takk fyri at tit lýddu á.

Vegna felagið trolskip

Jens Pauli Petersen

Dánjal í Skálum